# Skulu hugsa seg væl um

Íslendingar eiga at hugsa seg væl um, áðrenn teir gera av at fara upp í Evropasamveldið. Sum tjóð eiga teir at kenna seg fullkomiliga sannførdar um, at tað er tað rætta, áðrenn avgerðin verður tikin, og teir eiga at lata ES skilja, at teir vilja sleppa upp í samveldið. Hetta segði Diana Wallis, næstformaður í ES-tinginum, í einum fyrilestri á lærda háskúlanum í Reykjavík í gjár. Hon segði, at tað ber ikki til at fara upp í ES fyri at loysa sínar búskapartrupulleikar og vísti í hesum viðfangi á, hvussu ES hevur viðgjørt kreppuna í Grikkalandi.



# Stjórar skulu fáa sekkin

Í Danmark er Danski Fólkaflokkurin í øðini, eftir at danska kringvarpið hevur avdúkað, at sjúkrahús í teimum ymsu landspørtunum sýta fyri at viðgera sjúklingar, sum búgva í øðrum landspørtum. Tað er beinleiðis í stríð við lógina, og teir sjúkrahússtjórar, sum bróta lógina, eiga at fáa sekkin alt fyri eitt, sigur Lisbeth Blixt, sum er framsøgukvinna hjá Danska Fólkaflokkinum í heilsumálum. Í sending hjá kringvarpinum er komið fram, at meiri enn 50 sjúkrahúsdeildir sýta fyri at taka ímóti sjúklingum úr øðrum landspørtum.

# Á ferð í orðalandi

**Í nýggju mállærubókini Harry og Elly sleppa næmingarnir á ferð í alskyns orðalond, har tey læra at ansa eftir vandunum, tá tey skulu læra at stava rætt**

MÁL

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*




*Hópin av tekingum gera tað stuttlig hjá næmingunum at ferðast saman við Harry og Elly í ymsu orðalondunum í nýggju mállærubókini*

Bókin um Harry og Elly er skipað sum fýra ferðir til hugnalig ævintýralond.

Í fyrsta parti fara Harry hjáljóðamaður og elly sjálvljóðakona eina ferð til Hjálands, haðan Hary er ættaður. Á ferðini leiða tey okkum lagaliga ígjøgnum stavseting í sambandi við hjáljóð.

### Í Navnorðaríki

Í øðrum parti gongur leiðin til Sjálvlands. Har fara tey at vitja abban, sum er so elligamal, at hann næstan ikki orkar at ganga. Tríburarnir. Eivindur, Oyvindur og Eyð hava verið hjá abbanum í eina tíð, har tey læra okkum ymiskt, tá vit skulu stava okkurt við sjálvljóðum.

Í triðja parti fara Harry, Elly, tríburarnir og elligamli abbin til Navnorðaog Sagnorðaríkis. Her eru tey komin til ein sannan ævintýraheim við kongi, drotning, prinsi, prinsessu og pinkubarni.

Í nýggja orðaríkinum er alt nýtt og spennandi. Kongurin umboðar sagnorð, drotningin umboðar navnorð, prinsurin kallkyn, prinsessan kvennkyn og pinkubarnið hvørkikyn. Á ferðini vísa tey okkum, hvussu vit skulu ansa eftir ymiskum stavsetingarvandum í navnorðum og sagnorðum.

### Løgin kommahólmur

Í fjórða parti fara tey heimaftur. Á heimferðini sigla tey ímillum ymsar hólmar, sum tey fara at kanna nærri. Á hólmunum fáa tey uppaftur meir at vita um stavsetingarreglur tá tað snýr seg um sovorðið sum lysingarorð, hjáorð og fyrisetingar. Til endan síggja tey ein heilt serliga hólm, har ein omma gongur sum hevur taskuna fulla av kommateknum.

Nýggja mállærubókin er ætlað miðdeildini í fólkaskúlanum.

Tað eru June-Eyð Joensen, Sigri M Gaini, Sjúrður Juul Ravnsfjall og Ada Horn, sum hava skrivað bókina og Janus á Húsagarði, sum hevur gjørt tekningarnar.

Forlagið Sprotin gevur út bókina um Harry og Elly.

# Yrkingaslóð eftir Steimgrím Niclasen út í bók

**Fyri fyrstu ferð koma mongu yrkingarnar hjá lærarарnum og skúlastjóranum, Steingrím Niclasen, nú út í bók**

YRKINGAR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*




*Yrkingarnar hjá Steingrími Niclasen endurspegla eitt langt og fjølháttað lív við yrkingum um flestu lívsins tættir*

Mong munnu kennast við onkrar av yrkingunum hjá Steingrími Niclasen, sum hevur yrkt síðani hann var heilt ungur. Onkrar av yrkingunum hava verið á prenti í bløðunum og onkur sálmur hjá yrkjaranum er eisini at finna í sálmabókini.

Nógvar av hansara yrkingum eru tó bert kendar av einum parti av føroyingum, tí tær hava verið yrktar til ávís høvi ella ongantíð eru komnar á prent.

### Eitt lív við yrkingum

Nú pápin fer um tey sjeyti fimm, hava børnini hjá Steingrími Niclasen tikið sær um reiggj og fingið givið út eitt úrvalssavn av hansara yrkingum og týðingum. 128 yrkingar er tað vorðið til í savninum Yrkingaslóð, og kunnu tær býtast í nakrar høvuðsbólkar.

Fremst í huganum standa hansara sálmar og sangir, vísir Hanus A. Samuelsen á í innganginum til savnið. Síðani er tað barnayrkingarnar um óvitaárini í Hvalba, um farna tíð og burturmistan heim.

Eisini eru yrkingar um ymsu viðurskiftini í mannalívinum, bæði í gleði og sorg, um náttúruna, um gerandislív og hátíðarstundir, um samfelagsviðurskifti, har sjálvstýrissinnaðu politisku yrkingarnar fyltu nógv og ofta vóru at síggja í Dagblaðnum í hansara yngru árum. Fleiri av yrkingunum eru gjørdar til ávís høvi, har fólk antin hava heitt á yrkjaran ella hann sjálvboðin hevur latið eina yrking til onkran merkisdagin.

### Siðbundin yrkjari

Hanus A Samuelsen vísir á, at Steingrímur Niclasen er í bólki við teimum siðbundnu yrkjararnum og hevur ikki fylgt teimum rákum, sum komu fram, tá hansara ættarlið var ungt. Hann nýtir nógv rím, bæði endarím og stavrím og fasta rýtmu. Ofta eru yrkingarnar gjørdar til kend lag. Nógvar av yrkingunum eru fáorðaðar, mest sum hittinorð. Sama er við reglulongdini. Lagbundnar yrkingar setur hann ofta upp við einum ella heilt fáum orðum, so tær fáa ein eyðkendan knappan stíl.

Tað er forlagið Sprotin, sum gevur út Yrkingaslóð eftir Steingrím Niclasen.

# Uppskot um fólkaatkvøðu er á veg

**- Vónandi vilja tingfólk úr øllum flokkum koma við sum uppskotstillarar ella taka undir við uppskotinum um fólkaatkvøðu um at varðveita Føroyar sum eitt valdømi, sigur Edmund Joensen, løgtings- og fólkatingsmaður, ið arbeiðir við at tilevna uppskot um vegleiðandi fólkaatkvøðu at leggja fyri Løgtingið**

TÍÐINDASKRIV



- Føroyar eiga at vera verandi eitt valdømi fyri øll, og nú má veljarin sleppa at taka støðu.

Tað sigur Edmund Joensen, løgtings- og fólkatingsmaður, ið er farin undir at tilevna uppskot um vegleiðandi fólkaatkvøðu um at varðveita Føroyar sum eitt valdømi.

- Vónandi vilja tingfólk úr øllum flokkum koma við sum uppskotstillarar ella taka undir við uppskotinum um fólkaatkvøðu, sigur hann.

Óseriøst at broyta valskipan eftir tveimum árum

Beinleiðis orsøkin til, at uppskot um fólkaatkvøðu nú verður gjørt, er, at ein partur av formansskapinum í Løgtinginum hevur trýst fram eitt uppskot um at fara aftur til eina ótíðarhóskandi valskipan við fleiri valdømum.

- Bert tvey ár er liðin, síðani Løgtingið setti skipanina við einum felags valdømi í verk. Alt ov tíðliga er at fara til eina aðra skipan longu nú. Verandi skipan má fáa loyvi at roynast í verki nøkur løgtingsval, so vit veruliga kunnu síggja tey positivu árinini av henni, sigur Edmund Joensen.

### Støða fyrst takast til fólkaatkvøðu

Uppskotið um leiðbeinandi fólkaatkvøðu, ið er á veg, hevur ta fortreyt, at tað verður viðgjørt samtundis sum uppskotið um at fara aftur til fleiri valdømi. Samtykkir Løgtingið uppskotið um fleiri valdømir, skal støða takast til fólkaatkvøðuna eisini. Tað serliga er, at fólkaatkvøðan skal haldast og úrslitið staðfestast, áðrenn lógin um fleiri valdømi kann koma í gildi.

### Nú má veljarin sleppa at tala

- Fáir spurningar egna seg so væl til fólkaatkvøðu sum hesin – og serliga nú summi vilja skrúva tíðina aftur og seta í gildi eina gamla og órættvísa skipan, ið hoyrir fortíðini til.

- Eg kann illa ímynda mær, at nakar løgtingslimur fer at nokta fyri, at veljarin sleppur at taka støðu til sína egnu demokratisku valskipan, sigur Edmund Joensen.